# Kapping hjá teimum ungu

**Leygardagin 21. februar skipaði Bogaskjótifelagið Tambar í Havn fyri kapping millum tey yngru**

**bogaskjóting**
*tíðindaskriv*



*Í kappingini í recurve skeyt Eirikur í Jákupsstovu seg upp á nýtt føroyskt met fyri dreingir*

Skotið varð á 15 metra frástøðu móti 60 cm skivu. 23 luttakarar vóru við í kappingini.

Í bólkinum recurve luttóku 18 skjúttar og vóru tað sum ikki einaferð tveir skjúttar Eirikur í Jákupsstovu og Annika Vang, sum løgdu seg nakað fram um hini og høvdu harðan dyst sínámillum. Eirikur førdi við einum stigi, tá kapping var hálvrunnin, og svaraði Annika aftur við at vinna seinnu helvt við einum stigi.

Tey endaðu sostatt við líka stigatali 570 stig, men hevði Eirikur ein 10-ara fleiri enn Annika og vann kappingina. Hetta var samstundis nýtt føroyskt met fyri dreingir. Gamla metið var 549 stig.

Endaligu úrslitini vóru: Vinnari Eirikur í Jákupsstovu við (283+287) 570 stigum og 36 10-arum, nr. 2 Annika Vang við (282+288) 570 stigum og 35 10-arum, bæði úr Ørvi, og nr. 3 Petur Martin Jacobsen, Tambar, við (242+230) 472 stigum og persónligum meti.

Í bólkinum vóru fyri uttan føroyska metið hjá Eiriki 10 persónlig met.

Í bólkinum compound luttóku 5 skjúttar, allir úr Ørvi. Her var kappingin eisini jøvn millum tríggjar teir fremstu.

Endaligu úrslitini vóru: Vinnari Eyðfinn Poulsen við (278+278) 556 stigum, nr. 2 Kaj Johannesen við (272+276) 548 stigum og nr. 3 Robin Jønsson við (272+273) 545 stigum.

Allir skjúttar í hesum bólki settu persónlig met.

Samanumtikið ein góð kapping við góðum úrslitum, har 16 av 23 skjúttum skutu persónlig met.



*Robin Jønsson, Ørvur*



*Kaj Johannesen, Ørvur*



*Eyðfinn Poulsen, Ørvur*



*Annika Vang, Ørvur*



*Petur Martin Jacobsen, Tambar*




## Evnisdagur um Retinitis Pigmentosu

Leygardagin 28. februar verður evnisdagur um Retinitis Pigmentosu á Føroya Blindastovni. Dagurin er ætlaður teimum, sum hava hesa eygnasjúku, og avvarðandi teirra.

Á skránni er t.d. filmur um sjúkuna, og við vera Arne Christensen, sosialráðgevi á Blindainstituttinum og blindur av RP, og Karen Damholt, sálarfrøðingur, sum hevur starvast nógv ár á Blindainstituttinum.

**Saman við luttakarunum fara tey at tosa um nógv ymisk evni, t.d.:**
- hvat vil tað siga at fáa RP og at missa sjónina
- hvussu sigur ein øðrum frá sínum sjónstrupulleikum
- hvussu verða familja og avvarðandi ávirkað
- nær skal ein biðja um serkøna hjálp
- hvat við hjálpartólum og frálæru
- hvat við útbúgving og arbeiði

Við verður eisini ráðgevi hjá fyritøku, ið umboðar hjálpartól.

Neyðugt er at boða frá um luttøku innan fríggjadagin 27. februar á tlf. 31 82 22.

Eru fyrispurningar, eru tit vælkomin at ringja og spyrja eftir Karini Kass.

Føroya Blindastovnur

## Grundstykki til sølu

Matr. nr. 91C 1164 m² liggur miðskeiðis á Argjum, við sera góðum útsýni.

Boð undir 1 mió. ongan áhuga.

**Valbjørn Dalsgarð, byggimeistari tlf. 219279**





**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3404, P/F Viking Fish Protein, 530 Fuglafjørður.

**Viðtøkur broyttar:**
28.02.2003
**Kapitalur:**
Hækking við kr. 2.001.000,00 til kr. 3.501.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 2.001.000,00 til kurs 100.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Bergur Poulsen, Nýggivegur, 620 Runavík (formaður).
**Innkomin í nevndina sum formaður:** Pól Huus Sóltein, 513 Syðrugøta.

*Skráseting Føroya tann 23. februar 2004*

*Kristin Balle*


Skeiðsdepilin
FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## SKEIÐ
### serliga ætlað starvsfólki í almenna økinum

**Fíggjarskipan Landsins**
**Tíð:** 24. og 25. mars 2004

**Innihald**
* at fáa eina vitan, sum kann nýtast í samband við arbeiðsuppgávur, sum hava við landsins fíggjarskipan at gera.
* at fáa yvirlit yvir mannagongdir og reglur sum galda fyri arbeiði við at gera tilfar til fíggjarlógaruppskot.

Skeiðið er ætlað starvsfólkum og leiðarum, ið annaðhvørt gera ella vænta at skula gera játtanaruppskot, umsita játtanir ella teimum, sum bara vilja kenna grundleggjandi reglurnar á økinum og duga at skilja og nýta fíggjarlógina og aðrar játtanarlógir.
**Tilmelding:** áðrenn 15. mars 2004

**Starvsfólkarættur I**
Vistarskeið 15. og 16. mars 2004

**Innihald**
At fáa yvirlit yvir reglur og mannagongdir, sum galda fyri starvsfólkafyrisiting. Á skeiðinum verður dentur lagdur á ta dagligu starvsfólkafyrisitingina. Tær mest viðkomandi reglur og mannagongdir verða gjøgnumgingnar. Við ítøkiligum dømum verður víst, hvussu starvsfólkamál verða loyst.
**Tilmelding:** áðrenn 4. mars 2004

**Starvsfólkarættur II**
Vistarskeið 3. og 4. mai 2004

**Endamál**
At verða førur fyri at vera við í starvsfólkaligum avgerðum í sambandi við eitt nú at umskipa almenna sektorin, t.e. at seta fólk í starv, nýggjar ella broyttar uppgávur hjá verandi starvsfólkum, bygnaðarbroytingar og uppsagnir.

**Málbólkur**
Stjórar og málsviðgerðar, sum fáast við starvsfólkaviðurskifti, og sum hava nakað av royndum í starvsfólkarætti ella hava verið á t.d. skeiðnum Starvsfólkarætti I.
**Tilmelding:** áðrenn 20. apríl 2004

Undirvísarar frá Fíggarmálastýrinum Thomas Magnussen, deildarstjóri, Atli Leo, ráðgevi og Durita Tausen, fulltrúi.

**Kostnaður: Fíggjarskipan kr. 3200,- /Starvsfólkarættur I og II 3900,- fyri hvørt**

Lesið meira um skeiðini á okkara heimasíðu **www.skeidsdepilin.fo**

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo

team85

FØROYA LANDSSTÝRI

**Almannamálaráðið**

## Avloysari fyri løgfrøðing í barnsburðarfarloyvi

Eitt starv sum avloysari fyri løgfrøðing í barnsburðarfarloyvi verður leyst til setan í Almannamálaráðnum sum skjótast til umleið 1. oktober 2004.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. mars 2004, kl. 12.00.

Fleiri upplýsingar um starvið eru at finna á www.amr.fo

www.sosialurin.fo